# Funkur í RVG – stovna innanhýsis skjøl

Í hesum partinum verður greitt frá, hvussu innanhýsis skjøl verða stovnað.

1. Trýst á **Stovna**




2. Trýst á sjóneykuna fyri at leita eftir einum kreditori



3. Til ber, við ymsum upplýsingum, at leita eftir veitara. Tá ið leitað verður við kontunummari eftir veitara, skal kontunummar verða skrivað við **ongum** skrásetingarnr. frammanfyri., t.e. ikki við 9181 (Eik), 9870 (SS) o.s.fr. Tá ið veitari er funnin, verður trýst á **veitaran**, fyri at velja viðkomandi, so **OK** og **Stovna**.






# Funkur í RVG – stovna innanhýsis skjøl

4. Tá ið innanhýsis skjalið er stovnað, verður teldubræv sent frá RVG at kunna um, at ein uppgáva er stovnað í RVG. Tey, ið ikki vilja móttaka teldubrøv frá RVG, hvørja ferðina ein uppgáva liggur í RVG, kunnu broyta stillingarnar Í Outlook soleiðis, at teldubrøvini verða flutt í aðra mappu enn mappuna **Indbakke/Inbox**. Sí vegleiðing her.




5. Sæst innanhýsis skjalið ikki, trýst so á **Dagfør**. Innanhýsis skjalið er stovnað, tó ikki við upplýsingum um upphædd, kontering, gjaldstreytir, bókingartíðarskeið, viðheft skjal o.a. Trýst á **Stovna rokning**.



# Funkur í RVG – stovna innanhýsis skjøl

6. Klárt er at skráseta lýsing, upphædd, móttøkudag, rokningardag, GL-dagf., viðskiftara stað, kontu og at viðhefta skjal o.a.



# Funkur í RVG – stovna innanhýsis skjøl

7. Trýst á **Stovna nýggja linju** fyri at stovna konteringslinjur. Minst til at trýsta á **Goym** fyri at goyma konteringarnar.



8. Tá ið konteringslinjurnar eru stovnaðar, er næsta stig at viðhefta skjal, og eru tveir hættir at gera tað:
   - ‘**Toga og slepp’ (Drag and Drop**) viðkomandi skjal frá skrivaraborðinum ella mappu, har skjalið liggur, yvir í hetta økið og trýst á **Stovna**
   - Trýst á **Vælg fil** fyri at viðhefta viðkomandi skjal og, sí punkt 9 á næstu síðu, ....



9. ... vel viðkomandi skjal og trýst á **Åbn**.




10. ... og trýst á **Stovna**. Tá ið skjalið er viðheft, verður trýst á **Goym**. Aftaná at goymt er, ber til at síggja skjalið, ið er viðheft.



# Funkur í RVG – stovna innanhýsis skjøl

11. Aftaná at goymt er, ber til at síggja skjalið, ið er viðheft undir **Skjøl 2**.




12. Nú ber til at senda rokningina øðrum brúkara at góðkenna ella leysgeva.

